# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*-Vinnur Hillary ikki í Texas og Ohio 4. mars, vænti eg ikki, at hon verður forsetavalevni í heyst*

*Bill Clinton*

# Texas er hennara seinasti møguleiki

**-Vinnur Hillary ikki í Texas og Ohio, vænti eg ikki, at hon klárar tað, sigur Bill Clinton**

Dagurin 4. mars 2008 kann fáa sera stóran týdning fyri politiska lívið hjá Hillary Clinton. Tann dagin hava demokratarnir uppstillingarval í teimum báðum stóru statunum Texas og Ohio, og aftan á tíggju ósigrar á rað hevur Hillary brúk fyri at vinna teir báðar. Tað siga eygleiðararnir, og tað sigur maður hennara eisini.

-Vinnur hon í Texas og í Ohio, vænti eg, at hon verður forsetavalevni hjá demokratunum í heyst. Vinnur hon ikki, so vænti eg ikki, at hon klárar tað. Avgerðin er tykkara, segði Bill Clinton, tá hann í gjárkvøldið hjálpti konuni á veljarafundi í Beaumont í Terxas.

Umframt Texas og Ohio hevur Rhode Island eisini uppstillingarval tann 4. mars. Men tað er uttan iva úrslitið í Texas, sum fær tann størsta týdningin, tí staturin hevur ikki færri enn 228 valmenn á tí endaliga uppstillingarfundinum hjá demokratunum.

Tær seinastu meiningakanningarnar vísa, at Hillary Clinton er eitt vet framman fyri Barrack Obama í Texas, men eygleiðarar vísa á, at henni tørvar greiðar sigrar í teimum statunum, sum eftir eru, um hon skal tryggja sær fleiri valmenn enn Obama. Sambært útrokningum hjá AP-tíðindastovuni skal Hillary Clinton vinna 57 prosent av teimum valmonnunum, sum eftir eru at stríðast um.

Í løtuni hevur Barrack Obama 1.178 valmenn í sínum parti, meðan Hillary Clinton hevur 1.024. Enn eru 1.025 valmenn eftir at dystast um, og 334 teirra eru úr Texas og Ohio.



*Bill Clinton hevur sæð skriftina á vegginum. Hillary má vinna 4. mars*
*Mynd: AP*

# Angela mátti á sjúkrahúsið aftan á avhoyring hjá løgregluni

**Ein sjónbandsupptøka úr avhoyringarrúminum hjá løgregluni í býnum Schrewport hevur skelkað amerikanska fólkið**



*Soleiðis sá Angela Garbarino út aftan á avhoyringina á løgreglustøðini í Schrewport*
*Mynd: ABC News*

Tann 17. novembur í fjør tók løgreglan í Schrewport í amerikanska statinum Louisiana ta 42 ára gomlu Angela Garbarino á løgreglustøðina, tí hon hevði drukkið í meira lagi. Á sjónbandsupptøkuni úr avhoyringarrúminum á løgreglustøðini sæst, at Angela vil sleppa at ringja til ein ella annan, men at løgreglumaðurin Wiley Willis, sum er í rúminum saman við henni, sigur nei.

Tað sæst eisini, at kvinnan hevur ikki hug at samstarva við løgreglumannin, tá hann vil hava hana at blása í alkomátingartólið. Ístaðin fyri roynir hon at sleppa út úr rúminum, og tað endar við, at hon verður løgd í hondjørn og sett á ein stól.

So sløkkir Wiley Willis upptøkutólið í avhoyringarrúminum, og tá tað verður tendrað aftur, liggur Angela Garbarino í einum blóðhyli á gólvinum við brotnari nøs, tveimum brotnum tonnum og bláum eygum. Løtu seinni kemur ein sjúkrabilur á løgreglustøðina eftir henni og koyrir hana á eitt sjúkrahús.

Í sjónvarpssendingini Good Morning America hevur Angela Garbarino greitt frá, at løgreglumaðurin bukaði seg, eftir at hann hevði sløkt upptøkutólið. Løgreglan sigur, at hon datt og fekk skaða í andlitið.

Tann 5. februar fekk Wiley Willis sekkin, men hann hevur kært avgerðina. Síðani málið kom fram í sjónvarpinum, hava tvær kvinnur afturat meldað Wiley Willis fyri óregluliga framferð í arbeiðinum, skrivar blaðið The Schrewport Times.

## STUTT SAGT

### FBI í Eystur-Timor

Tríggir rannsóknarmenn hjá amerikonsku samveldisløgregluni FBI komu í gjár til Eystur-Timor at hjálpa myndugleikunum har at kanna tilburðin fyri einari góðari viku síðani, tá roynt varð at beina fyri José Ramos-Horta, forseta og Xanana Gusmao, forsætisráðharra. Tíðindastovurnar skriva, at teir tríggir amerikanararnir eru ikki teir einastu útlendsku løgreglumenninir, sum taka lut í kanningunum. José Ramos-Horta hevur ligið á sjúkrahúsi í Avstralia síðani drápsroyndina tann 11. februar. Hann varð illa særdur, men Xanana Gusmao slapp óskalaður frá álopinum.

### Darwin komin til Florida

Skúlamyndugleikarnir í amerikanska statinum Florida hava gjørt av, at menningarlæran hjá Charles Darwin skal verða tvungin lærugrein í øllum skúlum í statinum. Kristnar kreftir í Florida hava stríðst ímóti ætlanini at brúka Darwin í skúlunum í statinum, tí tær vilja hava skúlan at halda seg til skapanarsøguna í Bíbliuni. Kortini vunnu tær meiri frælslyntu kreftirnar, men avgerðin var tepur. Í mentamálanevndini vóru fýra atkvøður fyri at loyva Darwin inn um skúlagátt, og tríggjar vóru ímóti, skrivar AP.

### Ikki morð

Fyrrverandi bretski fregn artænastuyvirmaðurin Sir Richard Dearlove avsannaði undir einari hoyring í London í gjár, at Diana prinsessa og Dodi al Fayed vórðu myrd. Í hvussu er hevði MI6 ikki nakað við tilburðin at gera, segði hann. Avhoyringin var søgulig, tí tað er als ikki vanligt, at verandi ella fyrrverandi embætismenn hjá MI6 úttala seg í málum, sum eru vend ímóti tænastuni. Pápi Dodi, Mohammed Al Fayed, vil vera við, at MI6 beindi fyri soni hansara og Dianu eftir boðum frá kongshúsinum.